TILTØK Í JUNI 2003

Veiðimentaframsýningin er í Katuaq í Nuuk (GR) dagarnar 06. - 22. juni 2003

Gestir spæla á Nibe Festivalinum (DK) 20. juni 2003

Mánadag 2. juni
Ráðstevna »Nordic Rheology Society«
Fyriskipari er Fróðskaparsetur Føroya Kl. 10.00
Týsdag 3. juni
Ráðstevna »Nordic Rheology Society« Kl. 10.00
Fyriskipari er Fróðskaparsetur Føroya
Hósdagur 5. juni, Grundlógardagur.
Húsið er stongt
Fríggjadagur 6. juni
Mentanarnátt 2003.
Summarframsýningin 2003 letur upp Kl. 22.00
Listafólk: Astri Luihn, Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, Hansina Iversen, Rannvá Kunoy, Guðrið Poulsen, Zacharias Heinesen og Torbjørn Olsen
Summarframsýningin 2003 er í húsinum til og við 31. juli 2003
Fríggjadagur 6. juni
Íslendska kórið **»Sunnan Heiða«**
syngur KL. 23.00
Leygardagur 7. juni, hvítusunnuaftan
Húsið er stongt
Sunnudagur 8. juni, hvítusunnudagur
Húsið er stongt
Mánadagur 9. juni, 2. hvítusunnudagur
Húsið er stongt.
Fríggjadagur 13. juni
Bókin **»The Nordic Cultural Model«** hjá
Peter Duelund (DK) verður løgd fram Kl. 10.00
Fríggjadagur 13. juni
Konsert: Det Lille Operakor (DK) Kl. 19.30
Kórið telur 17 professionellar sangarar, knýttir at Kongaliga Sjónleikarahúsinum í Keypmannahavn.
Sungin verða verk eftir Verdi og Puccini umframt norðurlendskar sangir
Leygardagur 14. juni
Ráðstevna »Konference om kulturpolitik« Kl. 10.00
Fyriskiparar: Nordisk Kulturfond, Tórshavnar Kommuna, Listasavn Føroya og Norðurlandahúsið í Føroyum
Sunnudagur 15. juni
Ráðstevna »Konference om kulturpolitik« heldur fram Kl. 10.00
Mikudagur 18. juni
Summartónar 2003 fyrilestrar/verkstova:
»Komponistmøte Nordkalotten« Kl. 09.00
Fyrilestur: Olav Anton Thommessen, tónasmiður (N) Kl. 11.15
Fyrilestur: Erik Westberg, kórleiðari (S) Kl. 16.00
Summartónar 2003
konsert: MiN Ensemble (N) Kl. 19.30
Hósdagur 19. juni
Summartónar 2003 fyrilestrar/verkstova:
Komponistmøte Nordkalotten Kl. 09.00
Fyrilestur: Bjørn Andor Drage, tónasmiður/urguleikari (N) Kl. 11.15
Fyrilestur: Sunleif Rasmussen, tónasmiður (FO) Kl. 16.00
Summartónar 2003
konsert: KammeRana (N) Kl. 19.30
Fríggjadagur 20. juni
Summartónar 2003 fyrilestrar/verkstova:
Komponistmøte Nordkalotten Kl. 09.00
Fyrilestur: Thomas Rimul, dirigentur (N) Kl. 16.00
Summartónar 2003.
Elektronikkonsert (N), (FIN) og (FO) Kl. 19.30
Leygardagur 21. juni
Summartónar 2003 verkstova í samstarvi við Komponistmøte Nordkalotten Kl. 09.00
Sunnudagur 29.
Summartónar 2003 konsert : Kl. 15.00
Corona Guitarkonsert (DK)
og Sámal Petersen fiól (FO) , **í Gjáar kirkju**
Sunnudagur 29. juni
Summartónar 2003 konsert: Kl. 17.00
Corona Guitarkonsert (DK) og
Sámal Petersen (FO) fiól í **Bygdarhúsinum við Gjógv**

Húsið er opið gerandisdagar kl. 10:00 -18:00 og sunnudagar kl. 14:00-18:00
NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo;http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650

Dagrøktari

Dagrøktarskipanin í Klaksvíkar kommunu søkir eftir dagrøktarum at byrja eftir summarfrítíðina tann 18. august 2003.

Vit ynskja at tú
- hevur hegni og áhuga, at arbeiða við børnum
- kann geva børnunum ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag
- ert fyritakssamur og skapandi
- hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- kann samskifta við foreldrini
- ert sinnaður at samstarva við starvsfelagar og sosialu deild

Í heiminum má vera rúm til børnini at spæla í, og øki við girðing uttanfyri.

Vit kunnu bjóða eitt inspirerandi og lívsjáttandi starv við børnum.

Dagrøktarskipanin er ein stovnur undir sosialu deild hjá Klaksvíkar kommunu. Í skipanini starvast 26 dagrøktarar og 2 námsfrøðingar. Talið av børnum í dagrøkt er 120. Ein fastan dag aðru hvørja viku eru 3 dagrøktarar saman við børnum í spælistovuni.
Arbeiðstíðin er ímillum kl. 7.30-17.15. Lønin er sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Meir fæst at vita við at venda sær til Sigrun Vágstún, dagrøktarleiðara ella Jórun Niclasen, samskipara á telefon 41 00 00.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. juni 2003.

Klaksvíkar býráð,
Postsmoga 2
FO-700 Klaksvík

Bókhaldari

Søkt verður eftir bókhaldara at byrja tann 1. juli 2003, ella skjótast til ber.
Arbeiði fevnir um allar vanligar bókhaldsuppgávur, avgreiða tollingaráheitanir, lønir osfr.

Vit vænta:
At tú hevur viðkomandi útbúgving/royndir.
Tú mást hava førleika til at arbeiða sjálvstøðugt, verða reiðilig/ur og nærlagdur.
Vit leggja dent á, at bókhaldið er ajour.

Annað:
Lønin verður avtalað okkara millum.
Arbeiðstíðin er 08.00 - 16.10.

Skrivlig umsókn skal sendast til VR-Bilar, Box 3130, Hoyvíksvegur 61, FO-110 Tórshavn, Att.: Sverri Steintún.

VR BILAR
Hoyvíksvegur 61
Box 3130
FO-110 Tórshavn
VOLVO RENAULT

VR-Bilar selur VOLVO og Renault persónbilar, VOLVO lastbilar og VOLVO bussar í Føroyum. Vit hava lastbilaverkstað og persónbilaverkstað, við 11 mekanikarum, og eru tils. 18 starvsfólk.
VR-Bilar hevur verið í støðugum vøkstri, og vit stremba eftir at veita kundanum eina støðugt betri tænastu.

Frá Klaksvíkar Bókasavni

Í sambandi við at eitt av starvsfólkum okkara fer í farloyvi í eitt ár, verður við hesum lýst eftir

avloysara fyri hjálparfólk

at byrja 1. juli 2003.

Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna.

Starvsøkið fevnir um tað dagliga arbeiðið á bókasavninum, so sum:
- Skráseting
- Arbeiði í avgreiðsluni

Søkt verður eftir persóni:
- við kunnleika til nýtslu av EDV
- ið dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- ið er ágrýtin og fyrikomandi

Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Umsóknir verða at senda til:

Klaksvíkar Bókasavn
Postboks 45
700 Klaksvík

í seinasta lagi 10. juni 2003.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Anniku Egholm, býarbókavørð, tlf. 455757.

Landsbyggifelagið P/F
Grønlandsvegur 5 · Postboks 228 · FO-110 Tórshavn · Føroyar
Telefon +298 314744 · Telefax 298 310744 · E-mail lbf@lbf.fo

Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið við gerð av djúphavnsbryggju í Vági boðið út í almennari lisitatión.

Arbeiðið fevnir í stuttum um gerð av 194 metrum av nøggjari spunsjarnsbryggju, harav 86 metrar á 10 metra dýpi, við tilhoyrandi havnarøki og útgerð.

Høvuðsnøgdirnar eru hesar:

Stálspuns og -akker	uml.	525 tons
Grótarbeiði	uml.	52.000 m^3
Betong	uml.	900 m^3

Lisitatiónin verður á býráðsskrivstovuni í Vági mánadagin tann 30. juni kl.13.30.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi tann 10. juni 2003 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar kr 10.000,00, sum verður at flyta á konto 9181 271.842.3 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um tilfarið er aftursent í seinasta lagi eina viku eftir lisititatiónina.

Landsbyggifelagið P/F
Grønlandsvegur 5
Tórshavn

Hoyggjturkari



- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Biligur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman
  íroknað streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni
  fyri umleið kr. 20,- um timan
- Kvalitetur og long livitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.06.03

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo
Sosialurin 341800

Heimarøktin og Serforsorgin
Meginskrivstovan

Avloysarar til Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Harumframt eru røktaruppgávur, sum eru skipaðar í samstarvi við Heimarøktina.

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin ynskir avloysarar, ið m.a.:

- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og einsamøll í heimi brúkarans og samstundis eisini kunnu átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intutión
- vísa áhuga og virðing og samstundis vera professionellir
- eru sterkir – bæði til sálar og likam
- kunnu handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan

Størvini verða sett 15. juni 2003 ella skjótast aftaná.

Lønar- og setanartreytir:
Talan er um frítíðaravloysarastørv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi ag-, kvøld og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er sett til mánadagin 09.06.03 og umsóknir skulu sendast til:

Stuðlsfólkaskipanin fyri vaksin
att.: Regin Johansen
Eirargarði 2 – 2. hædd
Tlf. 30 40 20

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3564
Navn: Sp/f Stimbur
Adressa: Gripsvegur 28, 100 Tórshavn.
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 20.05.2003
Viðtøkudato: 20.05.2003
Kapitalur: Kr. 115.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 115.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Beinta Danielsen, Niðaragøta 15, 188 Hoyvík.
Stjórn: Beinta Danielsen, Niðaragøta 15, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2003 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka fysioterapistovu, keyp, søla og annað virksemi í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 27. mai 2003

Kristin Balle

Fiskimálaráðið
Aðalskrivstovan

Deildarleiðari til Fiskimálaráðið

Í Fiskimálaráðnum verður starvið sum deildarleiðari fyri fíggjar- starvsfólka- og umsitingarstápinum hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Deildin er nýskipað og er bygnaðarliga ein stápseind í Fiskimálaráðnum. Talan er um starv við spennandi avbjóðingum har ein týðandi partur verður at standa fyri menningini av virkisøkinum.

Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:
Dagligu leiðsluna av deildini, herundir hava ábyrgd fyri:
- Fíggjar- og roknskaparviðurskiftunum í Fiskimálaráðnum
- Starvsfólkamálum í Fiskimálaráðnum
- Umsitingarmálum í Fiskimálaráðnum
- At samskipa uppgávur, ið eru tvørgangandi ella hava felags endamál innan virkisøkið
- At samskipa felags stevið í innan- og uttanhýsis samskiftinum innan virkisøkið
- Ráðgeva í tvørgangandi málum í Fiskimálaráðnum og til landsstýrismannin
- Samstarva um tvørgangandi uppgávur í Fiskimálaráðnum annars

Førleikakrøv:
- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
- Duga at samskifa á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Hollan kunnleika til almenna umsiting
- Royndir at umsita fíggjarmál og starvsfólkamál
- Kunnleiki til fíggjar- og búskaparskipan landsins er ein fyrimunur
- Kunnleika til edv skipanir
- Leiðsluroyndir
- Góð samskiftisevni og hegni at fyriskipa
- Duga væl við fólki

Setanartreytir:
Løn- og setanarviðurskifti eru sambært avtalu millum avvarðandi yrkisfelasg og Fíggjarmálaráðið. Setanarið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Aðalskrivstovan.

Starvsheitið er deildarleiðari og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til aðalstjóran.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

Umsóknir:
Umsóknir, saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálaráðnum í hendi í seinsta lagi mánadagin 16. juni 2003 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

Fiskimálaráðið
postsmoga 347
110 Tórshavn.

Upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálaráðið á tlf. 353030 og tosa við Kaj P. Mortensen, aðalstjóra.

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820

Nýggjar TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð
Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12
Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480